

Tíðindi um góð úrslit viðvikjandi oljuleiting og framleiðslu eystan fyri føroyska markið kunnu eisini geva føroyingum góðar ábendingar.

# Væleydnað test av oljukeldu eystan fyri markið

**Jan Müller**

26.06.2014 - 18:18

Oljan.fo

Bretska oljufelagið Hurricane Energy boðar frá, at úrslitið av testing av avmarkingarbrunni á Lancaster oljukelduni vestan fyri Hetland er sera væleydnað. Testingin vísir, at til ber at fáa 9.800 tunnur av olju upp úr kelduni um dagin.

Lancaster oljukeldan, sum oljufelagið Hurricane stendur eisamalt fyri, verður mett at goyma 207 mill. tunnur av olju.

“Eg eri sera væl nøgdur við úrslitið av testingini, sum kemur áðrenn verulig framleiðsla kann byrja einaferð í framtíðini, sigur Dr Robert Trice, forstjóri í Hurricane.

Nú verður arbeitt víðari við komandi útbygging av kelduni. Lancaster liggur nærhendis Foinaven og Schiehallion oljukeldunum eystan fyri føroyska markið.